UTTAN ÚR HEIMI

# CIA brýtur flogbann í "føroyskum" loftrúmi

**Danmark hevur sett amerikonskum flogførum forboð fyri at flúgva í donskum loftrúmi, um endamálið við flúgvingini stríðir ímóti altjóða samtyktum. Men USA aktar ikki boðini**

FLÚGVING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri trimum vikum síðani, tann 10. oktober, fór eitt amerikanskt flogfar úr Reykjavík til Budapest í Ungarn. Á ferðini fleyg flogfarið millum annað ígjøgnum danskt ella "føroyskt" loftrúm.

Amerikanska flogfarið hevði skrásetingarnummarið N168D. Hetta er eitt flogfar hjá amerikanska felagnum Devon Holding & Leasing, sum sambært New York Times verður brúkt til at flyta fangar fyri fregnartænastuna CIA. New York Times hevur fyrr avdúkað, at felagið flytir fangar til lond, har tað er loyvt at pína teir.

Upplýsingarnar um flogferðina tann 10. oktober eru frá danska samferðslumálaráðharranum, Flemming Hansen, og tær eru komnar fram í sambandi við ein fyrispurning, sum ráðharrin hevur fingið frá fólkatingsmanninum Frank Aaen.

Per Stig Møller, uttanríkisráðharri, hevur fyrr upplýst, at Danmark hevur gjørt amerikonsku stjórnina varuga við, at CIA-flogfør við slíkum fangum skulu ikki flúgva ígjøgnum danskt loftrúm.

Í sínum fyrispurningi til samferðslumálaráðharran við Frank Aaen eisini hava at vita, hvørji ørindi eitt flogfar hjá amerikanska felagnum Path Corporation hevði, tá tað stóð í Kastrup 23 tímar í mars í ár. Tað er alment kent, at CIA nýtir eisini flogfør hjá hesum felagnum.

Frank Aaen hevur nú sent boð eftir uttanríkisráðharranum í samráð um CIA-flúgvingina.

# Aftur ein bumba

*Minst 20 fólk doyðu, tá ein bumba brast á einum sølutorgi í irakska býnum Basra fyrrakvøldið. Hendan myndin er frá jarðarferðini í gjár. Tað hava ikki verið so nógvar bumbuspreingingar har suðuri í Irak, har eitt nú bretskir og danskir hermenn hava støð, men í seinastuni er mótstøðan eisini harðnað har*



# Amerikanskur hermaður skuldsettur fyri at hava myrt sínar felagar

**Amerikanski hermaðurin Alberto Martinez kann fáa deyðarevsing, verður hann funnin sekur**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Alberto Martinez er skuldsettur fyri at hava verið tveimum av sínum feløgum í Irak at bana. Rættarmálið ímóti honum byrjaði í gjár og er tað fyrsta av sínum slagi í tvey ár.

Tilburðurin, sum málið snýr seg um, var tann 7. juni, tá tveir amerikanskir hermenn, Phillip Esposito og Louis Allen, doyðu í einari spreinging í einari av borgunum hjá Saddam Hussein í býnum Tikrit. Alberto Martinez var eisini har, og amerikanska herleiðslan heldur, at tað var hann, sum drap teir báðar felagarnar.

Teir tríggir vóru hermenn í einari eykadeild hjá tjóðarhirðini. Í fyrstani varð hildið, at teir báðir hermenninir doyðu av einari bumbu ella einari minu, sum uppreistrarmenn høvdu lagt, men kanningar á staðnum vístu, at so var ikki.

Fleiri, sum kendu teir báðar deyðu og Alberto Martinez, hava greitt frá, at viðurskiftini teirra millum vóru sera spent, og at Phillip Esposito hevði lagt eina ætlan um, hvussu hann og Louis Allen skuldu sleppa frá Martinez.

Talsmenn hjá ákæruvaldinum hjá herinum hava sagt, at Alberto Martinez hevði atgongd til tey vápn, sum blivu brúkt, tá hinir báðir hermenninir vórðu dripnir. Verður hann funnin sekur, kann hann fáa deyðarevsing.

Fyri einum hálvum ári síðani varð amerikanski hermaðurin Hasan Akbar dømdur til deyða fyri at hava beint fyri tveimum av sínum feløgum í Irak í 2003. Hann varð funnin sekur í at hava tveitt granatir inn í tjaldið, sum teir báðir hermenninir vóru í.

## Russar trúgva ikki Putin

Flestu russar hava ikki álit á myndugleikunum, og teir halda ikki, at Vladimir Putin, forseti, sigur allan sannleikan.

Tað sæst í einari kanning, sum stovnurin Romir hevur gjørt. Hon vísir, at 52 prosent av teimum spurdu siga seg ikki hava fult álit á einum einasta almenna stovni í landinum, og bara 30 prosent siga saeg hava álit á øllum, sum forsetin sigur. Støðan er uppaftur verri, tá tað snýr seg um dómsvaldið, ákæruvaldið og tjóðartingið, tí bara 10 prosent hava álit á teimum.

Korrupsjón er ein stórur trupulleiki í Russlandi. Ein kanning, sum varð gjørd herfyri, vísti, at tað hevur ongantíð verið so vanligt at rinda løgregluni og ymsum almennum eftirlitsmyndugleikum mutur, sum síðani Putin tók við forsetaembætinum.

## Huntley bukaður í fongslinum

Bretska blaðið The Sun veit at siga, at Ian Huntley, sum myrdi tær báðar smágenturnar Holly Wells og Jessicu Chapman, varð illa bukaður í fongslinum í summar. Tilburðurin skal hava verið í juli, men almenningurin hevur ikki frætt um hann fyrr enn nú.

Maðurin, sum leyp á Ian Huntley, eitur Daniel Neil. Hann skal hava greitt frá, at hann sá foreldrini hjá teimum báðum smágentunum í sjónvarpinum, og at hann svór at hevna tær, skuldi tað borið so á, at hann nakrantíð fór at møta drápsmanni teirra. Daniel Neil situr Wakefield-fongslinum dømdur fyri neyðtøku, og Ian Huntley situr eisini har.

- Tá eg møtti honum ein dagin í juli, misti eg tamarhaldið á mær sjálvum og leyp á hann, skal Daniel Neil hava sagt einari nevnd, sum kannaði tilburðin. Sambært The Sun hava aðrir fangar eisini gjørt seg inn á Ian Huntley. Eitt nú skal onkur hava stoytt kókandi heitt vatn á hann.

Mamma Ian Huntley, Lynda Nixon, mælti fyri tveimum árum síðani myndugleikunum til at avrætta sonin fyri tað, sum hann hevði gjørt.

## Kópurin fór við nøsini

Suðurafrikanska kvinnan Elsie van Troder hevði lagt til merkis, at ein kópur hevur ligið niðri í fjøruni eitt heilt samdøgur uttan at flyta seg, og hon bað tí nøkur vinfólk koma at hjálpa sær at fáa kópin aftur á sjógvin.

Tað skuldi hon ongantíð havt gjørt, skrivar Reuter. Kópurin vísti seg at hava tað gott, men hann var alt annað enn fegin um at verða órógvaður. Tá Elsie van Troder kom nóg nær, beit kópurin nøsina av henni. Tað eydnaðist vinfólkunum hjá Elsie at finna nøsina aftur, og hon varð so sett upp á pláss aftur. Men nakað av pastikki skuldi eisini til fyri at fáa hana snøgga.

Kópur er ikki óvanligur í Suðurafrika, men hóast teir yvirhøvur trívast væl saman við fólki, eru teir ikki vandaleysir.

- Kópur er rovdjór og hann hevur hvassar tenn. Vil illa til, kann hann bíta fólk til avlívis, sigur suðurafrikanska lívfrøðingurin Herman Oosthuizen við Reuter.

## Depardieu gevst

Tann kendi franski filmsleikarin Gerard Depardieu hevur gjørt av at taka seg burtur úr filmsyrkinum.

Depardieu, sum er 56 ára gamal, hevur spælt í 170 filmum, og hann hevur eina ferð verið í uppskoti til eina Oscar-virðisløn. Hann sigur við franska blaðið La Parisien Dimanche, at hann heldur seg hava fingið nóg mikið burtur úr filmslívinum, og at hann hevur rokkið teimum málum, sum hann setti sær. Og so er eingin orsøk til at halda fram, heldur hann.

Hann er kortini ikki heilt liðugur enn. Hann spælir í einum filmi, sum verður frumsýndur um stutta tíð, og í lø'tuni er hann í ferð við upptøkurnar til ein nýggjan film um tann kenda Asterix. Sjálvur spælir Depardieu leiklutin sum tann líka kendi Obelix.